52-139/2023

**Skrivligur fyrispurningur**
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingskvinna

**Svarari:** Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

**Evni:** Starvsfólka- og leiðsluviðurskifti á Skálagarði

**Spurningar:**

1. Eru starvsfólk úr øðrum londum komin at arbeiða á Skálagarði hesar seinastu vikurnar?
2. Er tað rætt, at partur av Skálagarði verður brúktur til íbúð til arbeiðsfólk, sum eru komin úr øðrum londum at arbeiða á Skálagarði?
3. Nær kann væntast, at ósemjan millum leiðaran á Skálagarði og Almannaverkið verður loyst, soleiðis at búfólk og starvsfólk á stovninum fáa ein tryggan og virðiligan gerandisdag aftur?

**Viðmerkingar:**
Tað var ein stórur dagur, tá skjøtul bleiv settur á Skálagarð. Sjálv var eg landsstýriskvinna tá, og var stjórin á almannaverkinum ein eldsál fyri at fáa Skálagarð til veruleika. Og enn størri dagur tá núverandi landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum opnaði heimið. Tí nú kundu fólk undir 67 ár við seinheilaskaða loksins fáa tilboðið roknað júst til teirra tørv. Hetta sum tey so leingi høvdu bíðað eftir. Tí er tað sera áhugavert at fáa at vita, hvussu gongur við Skálagarði, og um hann livir upp til endamálið.
Og nú frættist manna millum, at arbeiðsfólk seinastu vikurnar eru komin úr øðrum londum at arbeiða á Skálagarði, og at hesi arbeiðsfólkini eisini búgva á Skálagarði. Tí síggi eg tað sum alneyðugt og áhugavert at fáa at vita, hvussu arbeiðs- og starvsfólkaviðurskiftini eru á Skálagarði, tí uppruna endamálið við Skálagarði var bútilboð til fólk undir 67 ár við seinheilaskaða, og ikki til tey, sum arbeiða á Skálagarði.
Sum skilst eru onkrar ósemjur millum leiðaran á Skálagarði og Almannaverki í løtuni. Brúkarar og tey, sum búgva á Skálagarði, rópa varskó á sosialum miðlum um at fáa ein vanligan gerandisdag aftur, og at leiðarin skal koma til arbeiðis sum skjótast, tí íkomna støðan er ikki virðilig. Tí er eisini átrokandi, at ósemjan verður loyst, soleiðis at tey, sum búgva á Skálagarði, fáa ein vanligan dag aftur. Havandi í huga, at hetta er teirra heim.

**Á Løgtingi, 20. juni 2024**

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur